# Skóta-hjálpin 20 ár

**Sjálvhjálparbólkar til børn og ung, ið hava mist foreldur við deyða**

SKÓTAHJÁLPIN
*tíðindaskriv*

Skótahjálpin hevur avgjørt, at føroyska verkætlanin skal vera »Sjálvhjálparbólkar fyri børn og ung, ið hava mist foreldur við deyða«.

Í hálvtannað ár hava hesir sjálvhjálparbólkar verið virknir. Hetta arbeiðið hevur víst at sera stórur tørvur er á upplýsing á hesum øki úti í samfelagnum og ráðgeving til teirra, ið hava tørv á hesum. Ofta hava børnini tað trupult í skúlanum. Í flokkinum kunnu tey hava tað trupult í sambandinum við flokksfelagar, men eisini við forstáilsi og stuðli frá lærara og øðrum vaksnum, ið eru kring barnið/hin unga. Summi børn hava eisini tosað um trupulleikar í sambandi við avvarandi. Tey skilja ofta ikki hvønn annan. Meðan barnið/tann ungi er í samband við onnur sum eru í somu støðu, situr eftirsitandi foreldrið ofta einsamalt við síni sorg og tankum.

Hetta arbeiðið krevur sjálvsagt ymiskt tilfar, sum saman við prátinum kann hjálpa og stuðla teimum í sorgararbeiðinum. Eisini er ætlanin at keypa bøkur, sjónbond og tónleik, ið hóskar til teir ymsu aldurbólkarnar - og um møguleiki er, skuldi okkurt eisini verið umsett til føroyskt. Um tilfar skal fáast til vega er neyðugt við pengum, og vilja føroysku skótarnir her rætta eina hjálpandi hond.

Meira fast at vita frá Anna S. Dalsgaard tlf. 31 95 52/51 95 52

# Renna fyri fólkaheilsuni

**Í morgin skipa landsstýrismaðurin í almanna- og Heilsumálum, Hans Pauli Strøm, og Bragdið fyri Fólkaheilsurenning í høvuðsstaðnum. Renningin er ein liður í arbeiðinum fyri at betra um fólkaheilsuna hjá føroyingum**

FÓLKAHEILSA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Tað er blivið alsamt betri umtókt millum føroyingar at taka lut í rennitiltøkum. Í morgin verður neyvan undantak í so máta*

Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Hans Pauli Strøm, ætlar at gera sítt til, at fólkaheilsan í Føroyum betrast. Tískil hevur hann saman við felagnum fyri frælsan ítrótt í Havn, Bragdinum, tikið stig til at skipa fyri eini sonevndari fólkaheilsurenning í høvuðstaðnum í morgin.

## Renna ella ganga

Renningin verður fyri allar aldursbólkar. Børnini, fødd 1991 og yngri, renna tveir kilometrar. Hinir luttakararnir verða býttir í tvinnar bólkar. Ein bólkur verður nevndur vaksin, meðan tey, sum eru fødd í1958 og eldri, renna í einum bólki, sum verður nevndur veteranar. Hesir báðir bólkarnir renna ein tein, sum er fimm kilometrar langur.

Hjá summum kunnu fimm kilometrar tykjast sum ein nakað langur teinur, men fyrireikararnir siga, at tað er upp til hvønn einstakan luttakara, um tey renna ella ganga teinin.

Sagt verður, at fólkaheilsurenningin ikki hevur til endamáls at kappast, men heldur at geva bæði ungum og eldri eitt gott høvi til at koma út og røra seg. Tað týdningarmiklasta er at verða við, siga fyrireikararnir í einum tíðindaskrivi.

## Bøta um heilsuna og liviumstøðurnar

Fólkaheilsurenningin er ein liður í arbeiðinum hjá landsstýrinum at betra um fólkaheilsuna hjá føroyingum. Eins og í flestum av grannalondum okkara økist talið av sjúkutilburðum, sum beinleiðis koma av liviháttunum, t.v.s. eitt nú vánaligum kosti, ov lítlari motión og líknandi.

Landsstýrið er av teirri fatan, at tað er sera umráðandi at arbeiða fyri eini góðari fólkaheilsu, og hetta arbeiðið verður raðfest ovarlaga av landsins myndugleikum.

– Við at skipa fyri eini slíkari renning ynskja vit at gera vart við týdningin av at liva sunt. Øll hava vit gott av at røra okkum eitt sindur, og tí vóni eg at síggja nógv fólk í øllum aldrum til renningina leygardagin, sigur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum.

Fólkaheilsurenningin byrjar klokkan 15 í morgin, og byrjarnarnummurini fáast við badmintonhøllina tveir tímar undan byrjanini. Starturin á renningini verður frá p-økinum við badmintonhøllina.

Vinnararnir av renningini fáa heiðursmerkir, men allir luttakararnir fáa eisini eina t-troyggju við prenti á til minnis um dagin. Tá ið luttakararnir koma á mál, fáa teir eisini frukt og okkurt leskiligt at drekka.


*Tað er landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Hans Pauli Strøm, ið hevur tikið stig til fólkaheilsurenningina*

# Løgreglufólk á trivnaðarskeiði

**Í vikuni hava øll starvsfólk hjá løgregluni í Føroyum verið á skeiði, har tey hava fingið kunning um arbeiðsumhvørvi, strong og mat**

SKEIÐVIRKSEMI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Fyrr í vikuni vóru øll starvsfólk há løgregluni í Føroyum á skeiði í Havn. Á skeiðnum kunnaðu sonevndir Wellness-konsulentar um arbeiðsumhvørvi, strongd og matvanar. Sum tað eisini sæst á heitinum, so er endamálið hjá hesum Wellness-konsulentum at leggja lunnar undir, at fólk kunnu fáa tað betur.

Á sjálvum skeiðinum sluppu starvsfólkini hjá løgregluni ikki einans at sita afturá og bara lurta, tí Wellness-konsulentarnir gjørdu eisini nakrar rørslur, ið eru góðar at gera í gerandisdegnum saman við teimum.

Hetta við at skipa fyri slíkum trivnaðarskeiðum fyri sínum starvsfólkum er nakað, ið av álvara er við at vinna fram her á landi, og sum skilst eru tað fleiri fyritøkur og stovnar, ið hava víst hesum Wellness-konsulentum áhuga.


*Starvsfólkini hjá løgregluni í Føroyum sluppu at røra seg, tá ið tey vóru á skeiði mikudagin*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



*– Tað er fyrst og fremst arbeiðspláss, vit hava brúk fyri. Vit einum røktarheimi høvdu vit fingið 35 arbeiðspláss, og tú mást eisini hugsa um alt arbeiðið, sum skal gerast í samband við byggingina av einum røktarheimi og einum skúladepli. Avgerðin hjá býráðnum er tí burturvið, sigur Jens Sivar Djurhuus*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Tit hava gjørt eitt álvarsamt mistak

**15 vágbingar, sum í løtuni búgva í Havn, halda lítið um avgerðina hjá Vágs býráð at havna menningarætlanini hjá landsstýrinum. – Hugburðurin hjá vanliga vágbinginum í málinum er, at tað var ein býtt avgerð, sum Vágs býráð tók, tí ætlanin hjá landsstýrinum hevði skapt nøkur hart tiltrongd arbeiði í syðru helvt av Suðuroynni**

MENNINGARÆTLAN
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

– Tað er næstan skomm at vera vágbingur í hesum døgum. Vit rópa áhaldandi um hjálp, og tá, ið vit einaferð fáa hana, sigur býráðið nei takk, og eftir stendir fólki.

Tað er mikudag seinnapart, og vit eru stødd á skúlaheiminum í Marknagili í Havn. 15 vágbingar, sum í løtuni búgva í Havn, eru savnaðir saman fyri at gera vart við sína ónøgd um avgerðina hjá Vágs býráð at havna tilboðnum hjá landsstýrinum um ein skúladepil í Hovi og eitt røktarheim í Vági.

Teir 15 vágbingarnir eru misnøgdir við útsagnirnar, sum hava verið í fjølmiðlunum seinastu dagarnar, tí teir meta ikki viðmerkingarnar, sum hava verið frammi, umboða hugburðin hjá vanliga vágbinginum.

– Hugburðurin hjá vanliga vágbinginum í málinum er, at tað var ein býtt avgerð, sum Vágs býráð tók, tí ætlanin hjá landsstýrinum hevði skapt nøkur hart tiltrongd arbeiði í syðru helvt av Suðuroynni, sigur talsmaðurin Jens Sivar Djurhuus, sum er í læru sum timburmaður.

## Dennis fer skeivur

– Tað er tvætl at siga, at miðnámsskúlin í Vági hevur givið ávøkst seinastu 15 árini, tí tað einasta sum er vaksið er arbeiðsloysi.

Vágbingarnir eru alt annað enn samdir við útsagnini hjá samfelagsfrøðinginum Dennis Holm í Sosialinum mikudagin. Dennis metti tað vera rætt av Vágs býráð at havna tilboðið, tí miðnámsskúlin fer at geva ein nógv størri vinning enn eitt røktarheim.

– Tað er fyrst og fremst arbeiðspláss, vit hava brúk fyri. Vit einum røktarheimi høvdu vit fingið 35 arbeiðspláss, og tú mást eisini hugsa um alt arbeiðið, sum skal gerast í samband við byggingina av einum røktarheimi og einum skúladepli. Avgerðin hjá býráðnum er tí burturvið, sigur Jens Sivar Djurhuus.

Vágbingarnir vísa á, at flestu næmingarnir á miðnámsskúlanum í Vági fara at lesa víðari, og eftir lokna útbúgving flyta tey ikki aftur til Suðuroy, tí har er einki arbeiði til teirra. Miðnámsskúlin er tískil bert við til at útflyta fólk av oynni, halda vágbingarnir í Havn.

– Eg haldi, at Vágs býráð fyrst og fremst hugsar um seg sjálvan og ikki borgarnir í kommununi. Ein kallaði herfyri Vágs bygd fyri eina oyðimørk, og skulu vit koma burturúr trupulleikunum er bráðneyðugt at fáa arbeiði aftur í bygdina, heldur Jens Sivar Djurhuus.

## Fer at kosta

Spurdir, um teir vænta, at Vágs býráð verður revsað á kommunuvalinum í november mánað eftir, at teir havnaðu tilboðnum hjá landsstýrinum, svarar vágbingarnir avgjørdir, at tað vænta teir avgjørt.

– Um hetta ikki fær avleiðingar fyri býráðslimirnar, so er okkurt galið. Fær avgerðin ongar avleiðingar, ja so verða vit noyddir at flyta úr Vági, halda teir skemtandi fyri.

# Fáorðaður løgmaður

**Løgmaður Jóannes Eidesgaard heldur lítið um útsagnina hjá formanninum í Búskapar- og Løgfrøðingafelagnum, Niels Winther. – Hasar viðmerkingarnar eru av slíkum slagi, at eg havi ongan áhuga at gera nakrar viðmerkingar til tær. Málið er alt ov álvarssamt til sleingja við tíllíkum útsagnum, heldur løgmaður**

SKERJING Í MIÐFYRISITINGINI
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Vit stevna beinleiðis ímóti óskilinum í 80 árunum. Tað var eingin slingur í valsinum, tá formaðurin í Búskapar- og Løgfrøðingafelagnum, Niels Winther, var biðin um at siga sína hugsan um uppsagnirnar í miðfyrisitingini mikudagin.

– Hópuppsagnirnar í miðfyrisitingini eru ein liður í royndunum hjá ávísum politikarum at føra okkum aftur í 80-ini, har tilvild og ábyrgdarloysi ráddi í politisku skipanini, segði ein avgjørdur Niels Winter í Útvarpinum mikukvøldið.

Formaðurin í Búskapar- og Løgfrøðingafelagnum helt, at hópuppsagnirnar vóru ein liður í eini longari røð av hendingum, har politikarnir tilætlað royna ota seg inn á øki, sum umsitingin eigur at taka sær av.

## Sterk fyrisiting

Løgmaður, Jóannes Eidesgaard, hevur ikki stórvegis viðmerkingar til útsagnirnar hjá formanninum í Búskapar- og Løgfrøðingafelagnum.

– Hasar viðmerkingarnar eru av slíkum slagi, at eg havi ongan áhuga at gera nakrar viðmerkingar til tær. Málið er alt ov álvarssamt til sleingja við tíllíkum útsagnum, heldur løgmaður.

*Er umsitingin á veg aftur í 80 árini?*

Nei tað er hon ikki.Eg var landsstýrisamaður fyrst í nítiárunum, og tá høvdu vit eina veika og lítla umsiting. Eg vil siga, at vit í dag hava eina sterka og góða miðfyrisiting. Støðan í dag kann als ikki samanberast við áttatiárini.

*Kann borgarin kenna seg tryggan við viknaðu fyrisitingini?*

Ja avgjørt. Seinnu árini hevur umsitingin ment seg nógv og hon er eisini blivin størri í vavi. Tað er ikki so svart og hvítt, at uppsagnirnar gera miðfyrisitingini veikari. Búskaparligi veruleikin er, at vit eru noyddir at tátta í á fleiri økjnum, eisini í miðfyrisitingini, men vit hava framvegis ein góða og sterka fyrisiting.

Løgmaður sigur, at samgongan fer á fíggjarlógin fyri 2005 varskógva, at neyðugt er á fleiri økjum at spara.

– Vit verða øll noydd at taka eitt tak, og tað má miðfyrisitingin eisini, sigur Løgmaður.

